# Lestrarráðið á SFD

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Fundarfrágreiðing frá lestrarráðsfundi 18.05.2016

**Á fundi:** Sunrit Niklasdóttir (forkvinna), Súsanna M. Mortensen, Súsanna H. Tausen, Daniella Joensen, Karin Elisa Djurhuus, Liljan Witt (skrivari)

**Ikki møttar:** Marjun Gaardlykke og Guðrið Vesturgaard

Fundurin byrjar við morgunmati.

1) **Góðkenning av fundarskrá**
   Góðkend

2) **Góðkenning av seinastu fundarfrásøgn**
   Góðkend

3) **Súsanna Herdalur hevur upplegg um ásetingar í Bologna-sáttmálanum**
   Sí pp í viðfesta fíli

**4) Súsanna Mortensen hevur upplegg um:**

- **reglur Fróðskaparsetursins.**
- **kunngerð og námsskipan fyri útbúgving til sjúkrarøktarfrøðing.**
- **mannagongdir á SFD viðv. góðskrivan og yvirflytan.**

Limirnir fingu kopi av Løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (2012), Kunngerð um útbúgving til sjfr (2011), Kunngerð um próvtalsstiga og døming (2013) og Kunngerð um ískoytisútbúgving fyri sjrf og onnur við heilsufakligari miðallangari framhaldsútbúgving, útbúgvin eftir eldri lógum (2013), sum eru lógarkarmarnir rundanum útbúgvingarnar á SFD. (Limirnir kunnu fáa hendur á hesum skjølum við at fara inn á logir.fo og skriva Fróðskaparsetur Føroya í leititeigin). Harafturat gjøgnumgekk hon Námsskipanina fyri grundútbúgvingina, sum er ein operationalisering av lógum og kunngerðum. Hon vísti á, at tað í løtuni verður arbeitt við at gera eina felags kunngerð fyri allar útbúgvingar á Setrinum. Tá hon er gjørd fær millum annað lestrarráðið á SFD kunngerðina til hoyringar.

**5) Diskutera, út frá uppleggunum, leiklutin hjá Lestrarráðnum í mun til at røkka endamálinum um granskingargrundaða útbúgving á altjóða stigi.**

Limirnir eru samdir um, at teir við hesum uppleggum hava fingið meira innlit í og meira felags fatan av hvat uppgávan hjá Lestrarráðnum hesum viðvíkjandi inniber.

# Lestrarráðið á SFD

**5) Diskutera viðfesta skjalið[1] frá SSD um góðskriving og gera niðurstøðu um mannagongd viðv. góðskriving/yvirflyting fyri SFD.**

SMM vísir á, at í summar fer nýggj kunngerð fyri sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingina at koma í gildi í DK, sum leggur upp til meira tvørfakligt samstarv millum fleiri miðallangar heilsufakligar útbúgvingar. Soleiðis at skilja, at ein partur av útbúgvingunum verður felags. Samstundis hvørvir felags námsskipanin, sum hevur verið fyri allar 22 skúlarnar í DK og vit fara tí at fáa meira ymiskleika í donsku skúlunum, sum útbúgva sjrf. Hetta vil so aftur geva nýggjar avbjóðingar fyri okkum í lestrarráðnum, tá vit skulu góðkenna umsøknir frá lesandi úr DK, sum søkja um yvirflyting til okkum. SMM kemur á fundi í heyst at tosa meira um hetta.

Síðani vóru viðfestu skjølini frá SSD og útbýttu skjølini frá SFD umrødd og niðurstøðan av tí kjakinum er, at *SMM ger eitt uppskot um skjalfesting av góðskrivingum og tekur tað við á fundin 7. september*

**6) Diskutera um vit skulu gera egnar viðtøkur fyri lestrarráðið á SFD**

Í yvirornaðu viðtøkunum fyri Setrið stendur, at vit kunnu gera egnar viðtøkur fyri lestrarráðið á SFD. Hetta blívur tí umrøtt – millum annað kunnu vit útgreina í egnum viðtøkum møguleikan fyri at avgreiða skundmál í millum føstu fundirnar. Eingin endalig niðurstøða bleiv gjørd í hesum málinum. Vit hugsa víðari um hetta hvør sær og venda síðan aftur til tað seinni.

**7) Ymiskt**

**- diskutera ásettu fundir í lestrarráðnum 15. juni og 7. septembur 2016**

SN tekur hetta fram, tí hesi dato er onnur tiltøk á skúlanum eisini ásett, men eftir dialog við hinar limirnar í ráðnum, er semja um at fasthalda fundirnar hjá lestrarráðnum til hesi dato. Tvs. Næsti fundur verður 15. juni kl. 9-11. Á tí fundinum fara vit at umrøða spurningin um eftirmeting av undirvísing og útbúgvingum upp í tráð við viðtøkurnar fyri lestrarráðið.

Harafturat samdust vit um, at upprætta eina mappu á First Class til lestrarráðið, so samskiftið framyvir kann vera inni á tí stevnuni. *LW biður Heina Nygaard upprætta okkum hesa og leggur viðkomandi skjøl inn.*

Fundurin endar 11.40

(LW)

[1] Viðfest fundarinnkallan er arbeiðsskjal frá SSD til umsøknir um góðskrivan. Hetta kann vera íkast til okkara diskussión um mannagongd viðv. góðskrivan og yvirflytan á SFD.